## Teitur í rapp/rokk útgávu

Um talan er um tekniskan feil ella hacking er ikki greitt, men tey sum vitjaðu myspace síðuna hjá Teiti fríggjakvøldið, hoyrdu ikki fagran føroyskan singer/songwriter tónleik, men rapp við Beastie Boys.Løgini So Wat'cha Want, Brass Monkey, Check It Out og No Sleep To Brooklyn buldraðu úr telduhátalarunum, tá planet.fo vitjaði myspace.com/teitur. Men eftir eina løtu, riggaði aftur og løgini Louis Louis, Great Balls Of Fire og I Run The Carrousell vóru komin upp á pláss aftur.

## Kavi tarnaði flogferðsluni

Morgunflogfarið hjá Atlantic Airways við ætlaðari fráferð 8.15 varð seinkað vegna veður, nógvi kavin á breytini forðaði fráferðini. Roynt varð at grava og busta av flogbreytini, men tað bleiv við at kava í aftur. Um 10 tíðina gjørdust líkindini betur, og flogfarið fór á flog 2 tímar seinkað.

# Bjargingarfeløg hættaðu sær ikki út

**- Ta einu løtuna sunnunáttina var veðrið í Fuglafirði so ringt, at bjargingarfelagið helt tað ikki vera ráðiligt at fara út um dyrnar, sigur løgreglan í Havn**

SKAÐAVEÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað leikaði hart á í Fuglafiðri og aðrastaðni kring landið sunnunáttina. Sum leygarkvøldið leið, vaks hann upp í hvassan storm høgt, samstundis sum kavi legðist kring landið*

Leygarkvøldið og sunnunáttina vaks hann rættiliga vindin høgt, samstundis sum tað fór at kava rættiliga illa.

Eftir midnáttarleitið gjørdi herviligi stormurin um seg fleiri staðni kring landið, bæði í Norðoyggjum, Eysturoy, Streymoy og í Vágum.

### Útideyðaveður

Fleiri staðni kring landið hendu smærri og størri stormskaðar, tó ikki so, at hús fórust illa.

Takplátur rivu, okkurt vindeyga fór, og onkur hurð á bilhúsi kundi heldur ikki standa ímóti nógva vindinum.

Onkustaðni slitnaðu endar hjá skipum, sum lógu við bryggju, men tíbetur hildu aðrir endar, so skaði ikki stóðst av hesum.

Løgreglan í Havn sigur, at bjargingarfeløg kring landið royndu at hjálpa fólki eftir førimuni, men ta einu løtuna var veðrið í Fuglafirði so ringt, at bjargingarfelagið helt tað ikki vera ráðiligt at fara út um dyrnar.

Sum skilst, táttaði vindmegin sunnunáttina upp í seksti metrar rum sekundið, har ringast leikaði á.

Tað er av allar ringasta veðri og rættiligt skaðaveður.

### Góð hjálp

At bjargingarfeløg eru tøk undir slíkum umstøðum og eru til reiðar at hjálpa til, har á stendur, er við til at avmarka skaðarnar.

Líka so umráðandi, sum tað er, at einki leyst liggur og rekst í slíkum veðri, er tað umráðandi, at hond verður tikin um, har skaðar henda, so tilfar, sum skæðir seg leyst, ikki liggur og fýkur húsanna millum.

## Menna tónleikalívið í Klaksvík

**Klaksvík fær 14. apríl eitt hús við venjingarhølum til tónleikabólkar. Dávavirkið sum verður rikið av Virkishúsinum, hevur 8 nýggj venjingarhøli og eina konserthøll.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Eyðun Nolsøe var ein av berandi kreftunum í rákinum, ið fekk fólk at kalla Klaksvík fyri føroyska tónleika høvuðsstaðin*

Í 80'unum varð prátað um Klaksvík, sum tónlistarliga høvuðsstaðin í Føroyum, men longur og longur er blivið ímillum stórhittini úr Klaksvík, her hava Eysturoyggin og Havnin yvirhálað innanum. Men við hesi verkætlan, ið á nógvar hættir minnur um Margarinfabrikkini í Havn, kann hetta broytast almikið. Tann týdningur Margarinfabrikkin hevur havt fyri tónleikalívið í høvuðsstaðnum er ótrúligur.

Á Dávavirkinum verða tvey stór høli, tvey miðal høli og tríggjar boksir. Virkishúsið kemur at umsita hølini, sum einhvør einstaklingur ella bólkur kann leiga.

Eisini verður møguligt hjá øðrum at skipa fyri konsertum og tiltøkum annars í konserthøllini, sum hevur pláss fyri umleið 150 áhoyrarum. Um tú hevur tørv á einum venjingarhøli, so ber til at ringja til Virkishúsið á telefon 458510 ella 288510.

Ella við at støkka inn á gólvið gerandisdagar frá kl. 14.30 til kl. 22.30 í Virkishúsinum á Klaksvíksvegi 57.

Klaksvíkar kommuna hevur leigað bygningin, ið hevur staðið tómur eina tíð. Dávavirkið er upprunaliga eitt flakavirkið. Sostatt kann staðfestast, at tónleikalívið í Havnini húsast á eini gamlari margarinfabrikk, meðan tað eitt gamalt flakavirkið verður brúkt til tílíkt virksemið í Klaksvík, hetta tykist á onkran hátt hóskandi í fiskivinnubýnum Klaksvík.

Dávavirkið letur dyrnar upp leygardagin tann 14. apríl. Helst verður skipað fyri onkrari spennandi konsert hendan dagin, so tað er at fylgja við og leggja leiðina inn á gólvið.

- Vit á Virkishúsinum gleða okkum til at síggja tykkum øll í Dávavirkinum, skrivar tey á myspace heimasíðuni hjá Dávavirkinum: myspace.com/davavirkid

Fyribils hava afturmeldingarnar frá fólki verið sera góðar verður sagt úr Klaksvíkar.

# Ferðslan gingið væl eftir umstøðunum

**Løgreglan sigur, at tað gjørdist rættiliga hált í vikuskiftinum og nú í morgun, og tað ger tað ikki minni vandamikið í ferðsluni, tá bæði hált og nógvur vindur er**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Hesin bilurin fór út av vegnum inni í Hósvík seinnapartin sunnudagin, men tíbetur hendi ikki stórvegis mansskaði*

Kavin, sum brádliga legðist leygarkvøldið og sunnunáttina, órógvaði ferðsluna og førdi til fleiri smærri ferðsluóhapp, serliga í høvuðsstaðarøkinum, men eisini kring landið

Løgreglan í Havn sigur, at hóast sera vánaligu koyrilíkindini, sum stóðust av stormi og kava sunnunáttina, kom tíbetur eingin fráboðan um álvarsligan mansskaða.

Aftur mánamorgunin, tá ið fólk skuldu til arbeiðis, vóru ring koyrilíkindi, og fleiri leiðir hjá Bygdaleiðum vórðu avlýstar, serliga í Eysturoy.

Á Kambsdali var eingin skúlagongd, og sama var eitt nú á Oyrarbakka og Strondum.

- Vit mugu siga, at í mun til vánaligu koyrilíkindini - bæði sunnunáttina og nú í morgun við nógvari hálku og stundum nógvum vindi - hevur ferðslan gingið hampiliga væl. Vit hava fingið fleiri fráboðanir um smærri óhapp, men tíbetur hava vit ikki hoyrt um stórvegis mansskaðar.

Seinnapartin sunnudagin vóru eisini nøkur ferðsluóhapp, og millum hesi var ein bilur í Hósvík, sum fór skeivur á vegnum. Kvinna og maður vóru í bilinum, og kvinnan endaði á skaðastovuni við onkrum smærri snuddum í beinunum.

Løgreglan sigur, at tað gjørdist rættiliga hált í vikuskiftinum og í morgun, og tað ger tað ikki minni vandamikið í ferðsluni, tá bæði hált og nógvur vindur er.

- Jú, vit kunnu bara siga, at ferðslan eftir umstøðunum og líkindunum, sum hava verið, hevur gingið hampiliga væl, sigur løgreglan.